# Rullandi vørutombola fyri námsferð

**Leygardagin sær eitt nýtt tiltak dagsins ljós, tá ein skúlaflokkur úr Stranda skúla í bussi fer at skipa fyri rullandi vørutombola**

VØRUTOMBOLA
*tíðindaskriv*

Klokkan 10 leygarmorgunin sleppa oyndfirðingar sum teir fyrstu at royna nýggja rullandi vørutombola'ið. Tá byrjar bussurin rundferðina, sum tá liðugt er í Oyndarfirði, heldur áfram út í Skálabotn, út á Skála og víðari, alt eftir hvussu nógvir seðlar og vinningar eru eftir.

Tiltakið er ein partur av innsavningini, sum 9. b í Stranda skúla skipar fyri í sambandi við, at tey skulu námsferð til London.

Tiltakið er skipað soleiðis, at næmingarnir og foreldur teirra hava útvegað um 400 vinningar. Vinningarnir vera so fyltir inn í ein stóran buss, sum so fer at koyra bygd úr bygd leygardagin, og byrjað verður sum sagt í Oyndarfirði klokkan 10.

Ístaðin fyri at stilla bussin eitt ávíst stað, steðgar bussurin á fleiri støðum í bygdunum, og farið verður síðani í hvørt einstakt hús.

Í sambandi við hetta tiltakið hava fyrireikararnir gjørt av at royna við einum serligum eydnuposa við lutaseðlum. Til ber at keypa 20 seðlar í einum posa og tann sum ger tað, hann er tryggjaður í minsta lagi ein vinning.

Sum sagt er hetta tiltakið partur av innsavningini til námsferðina, sum næmingarnir í 9. b í Stranda skúla skulu til London. Í alt 18 næmingar av Skála, úr Skálabotni og úr Oyndarfirði fara avstað umframt tríggir leiðarar.

Á ferðini í hesum forkunnuga býi fara næmingarnir at vitja ymisk áhugaverd støð, so sum National History Museum, Science Museum, BBC og Madame Tussaud. Harumframt er eisini ætlanin, at fara til ymisk onnur áhugaverd tiltøk meðan flokkurin er í London.

Ein slík ferð kostar fitt av peningi og í tí sambandi hava foreldrini saman við næmingunum gjørt av at skipa fyri ymsum tiltøkum og í hesum førinum var so gjørt av at royna við einum rullandi vørutombola eisini.

Umframt vanliga vinningin hava tey, sum hava vunnið, eisini møguleika at vinna ein vinning afturat. Vinnararnir skriva navn sítt og telefonnummar á baksíðuna á vinnaraseðlinum og leggja hann í ein posa til endamálið.

Tá dagurin er liðugur verður lutur drigin millum allar vinnararnar, um nakrar eykavinningar, sum í hesum føri er eitt betri máltíð á góðari matstovu. Fýra eykavinningar eru og matstovurnar, sum hava latið vinningarnar eru Casa Blanca í Runavík og Hotel Hafnia, Glasstovan og Hotel Tórshavnar Sjómansheim í Tórshavn.

Fyrireikararnir vóna, at tikið verður væl ímóti hesum spennandi tiltaki.



*Tað er 9.b á Stranda skúla, sum skipar fyri heldur øðrvísi tombola'num leygardagin*

# Ein reinur dropi í einum havi av óljóði

**Sunnukvøldið 13. feb. hevði Eivør Pálsdóttir saman við íslendska KaSa hópinum eina stórslidna konsert í Salinum í Kópavogi, Ísland. Átta løg hjá Eivør vóru útsett til strúkarar, floytu og klaver, og var hetta ein av serstøku konsertum Eivarar, ið verður framførd aftur leygardagin 19. feb. kl. 17 í Norðurlandahúsinum**



*– Bono segði einaferð um Jeff Buckley, at hann var "ein reinur dropi av vatni í einum havi av óljóði", og eg haldi, at hetta kann eisini sigast um Eivør*

UMMÆLI
*Sunneva E. Háberg Eysturstein*

Míni upplivilsir av Eivør Pálsdóttir higartil hava verið mong og ógvuliga fjølbroytt, og hava tey skift ímillum alt frá sálmum til kingo og víðari til tripphopp, jazz og country. Óansæð hvønn stíl av tónleiki, hon hevur spælt, hevur hon altíð megnað at bergtikið meg og (vil eg loyva mær at siga) allar áhoyrararnar, ið hava verið til staðar. Eisini gerst hon bert dugnaligari og meira hugtakandi fyri hvørja ferð, hon framførir.

Hóast tað, hevði eg nakrar rættiliga blandaðar kenslur, tá eg fór á konsert við Eivøri í Kópavogi seinasta sunnukvøld. Hetta kvøldið skuldi eg fyri fyrstu ferð hoyra tónleikin hjá henni í einum klassiskum høpi, og tað vakti ein lítlan iva í mær. Ein iva um hvørt hendan samansetingin av klassiskum ljóðførum og Eivør'sa víttfevnandi tónleiki, kundi skapa eina heild...

## KaSa byrjaði kvøldið

Tá ið áhoyrararnir høvdu sett seg, og konsertin byrjaði, komu fimm kvinnur inn á pallin. Tað eru hesar fimm, ið manna KaSa hópinn, og eru tær: Áshildur Haraldsdóttir á floytu, Sif M. Tulinius og Helga Þórarinsdóttir á violin, Bryndís Björgvinsdóttir á cello og Nína Margrét Grímsdóttir á klaver. Tær spældu tvey sera væl samanspæld og vøkur løg, ið løgdu eitt gott grundarlag fyri kvøldið.

Síðani kom Eivør á pallin, og saman spældu tær seks kvinnurnar átta løg hjá Eivør, ið hvør sær vóru løgd til rættis av fýra íslendskum tónleikarum, ið eru: Hilmar Ørn Hilmarsson, Árni Harðarsson, Pétur Grétarsson og Kjartan Valdimarsson. Nøkur av løgunum vóru serstakliga væl eydnað, ímeðan onnur kundu tykjast vera í so óruddilig. Um tað var av væntandi venjing ella um løgini ikki vóru løgd nóg væl til rættis, dugi eg ikki at siga. Tá tað er sagt, vil eg venda aftur til tað væl eydnaða og tær løturnar, tá heildin av framførsluni var hægst.

## Gullkornini

Fyrsta lagið, ið Eivør og KaSa framførdu, var "Kanska ein dag" av fløguni "Krákan". Eg hevði enn ikki vænt meg við hesa nýggju, klassisku útgávuna av tónleiki Eivarar, men sveimandi høgu tónarnir frá violinini og tvørfloytuni og restin av undirspælinum skaptu eina góða tónlistarliga mynd saman við orðunum "Kanska ein dag finna vit frið, kanska ein dag flúgva fuglar lið um lið. Kanska ein dag, tá høga aldan hevur lagt seg, kanska ein dag so finna vit frið."

Tvey av gullkornunum hetta kvøldið vóru "Hjarta mítt" og "Elisabeth og Elinborg." Bæði løgini vóru væl løgd til rættis og uppnáddu eina vakra eind við røddini hjá Eivøri sum hæddarpunkt. Eisini varð ein góð útseting gjørd av laginum "Nú brennur tú í mær", har KaSa fyrst hevði eina 'pumpandi' og uppbyggjandi byrjan, ið síðani varð eftirfylgd av rútmikki, sangi og gittarspæli frá Eivør.

## "Trøllabundin eri eg"

Eg ivist í, at eg eri tann einasta, ið heldur, at Eivør er best sum einstaklingur, av tí at tá kemur hon veruliga til sjóndar sum sonn tónlistarkvinna. Tá er einki, ið órógvar hana í at vera tann, sum hon er, og gera tað, sum hon ger. Ímillum framførslurnar við KaSa, spældi Eivør nøkur løg einsamøll, so sum "Rura, rura barnið" og "Trøllabundin", har hon við ómetaligu rødd síni og indiánara-trummu megnaði at venda hvørjari einastu hugsan og kenslu í salinum til sín. Í "Trøllabundin" syngur hon um, hvussu tónleikurin er fyri hana sjálva, men eisini sigur teksturin júst tað, ið tónleikur hennara ger við áhoyrararnar: "Trøllabundin eri eg, galdramaður festir meg, festir meg"

Bono segði einaferð um Jeff Buckley, at hann var "ein reinur dropi av vatni í einum havi av óljóði", og eg haldi, at hetta kann eisini sigast um Eivør. Hvussu samfelagið so er, og óansæð hvørji óljóð eru rundan um okkum, so skarar røddin hjá henni altíð burturúr og letur okkum sita eftir við einari kenslu av friði og nøgdsemi. Tann blandaða kenslan, eg hevði áðrenn konsertina, var bert bygd uppá botnleysar fordómar, sum vóru gloymdir aftaná. Eivør klárar altíð at útinna sítt verk, tí hon hevur tær røttu tónlistarligu dygdirnar til tað. Saman við KaSa hópinum hevur hon enn einaferð klárað at framført sín tónleik í einum nýggjum, hugtakandi samanhangi, sum uttan iva er verdur at hoyra.

Hevi verður til tað leygardagin 19. februar kl 17, tá Eivør aftur trínur á pallin saman við KaSa hópinum í Norðurlandahúsinum.